

# Nógv fólk søgdu Dúgvuni farvæl

**Ein rúgva av fólki vóru savnaði saman at siga dúgvuni farvæl. - Dúgvan hevur verið sosiala samlingsstaðið hjá norðoyingum, segði Jacob Vestergaard millum annað í røðu sínari**

*Heini S. Kristiansen*
Heinik@sosialurin.fo

Dúgvan legði at klokkan 13.30 ein hálvan tíma seinkað. Nógv fólk vóru komin saman á ferjuleguni. Klaksvíkar Hornorkestur spældi á landi og umborð vóru eisini hornleikarar, sum undirhildu ferðafólkunum.

Tá ið lúkan opnaðist, komu ferðafólkini gangandi út við løgmanni á odda. Veðrið var sera gott, og øll sóu út til at vera í góðum lag. Kristian Davidsen, stjóri á strandferðsluni, byrjaði við at hada røðu. Hann hugleiddi um, hvussu ferðslan um leirvíksfjørðin hevur ment seg gjøgnum árini. Nú hava vit so rokkið eitt klimaks, nú tunnilin er latin upp. Hann takkaði manningini á Dúgvuni fyri trúgva tænastu og legði dent á, at tað er ikki vegna ónøgd við teirra tænastu, at tunnilin er gjørdur.

Jacob Vestergaard kom inn á, hvønn týdning hugnin umborð hevur havt fyri tey ferðandi.

Dúgvan hevur verið sosiala samlingsstaðið hjá norðoyingum.

- Fólk hava fingið tíð til at seta seg niður og hugsa. Tað hevur verið ymiskt, hvat fólk hava nýtt tíðina til, men tað hevur uttan iva verið gott fyri tey ferðandi at fáa ein steðg í skundmikla degnum, segði Jacob Vestergaard.

Eftir tí nostalgisku løtuna við ferjuleguna, var farið í skrúðgongu niðan til tunnilsmunan. Ellisakførini leiddu skrúðgonguna, og ein rúgva av fólki gekk aftaná. Hornorkestrið sat uppií einum lastbili og spældi march-tónleik.




*Føroya Bjór fagnaði tunnilinum Ein konvoy av bilum hjá Føroya Bjór koyrdu floytandi gjøgnum býin. Tað er eingin ivi um, at tunnilin fer at gera tað nógv lættari hjá Føroya Bjór at flyta vøru frá bryggjarínum í Klaksvík til handlar hinumegin fjørðin. HK*